*[ Nýggjársheilsanir frá teimum kendu ]*

# Nakrir av bólkunum, ið hava vitjað í Føroyum í 2005, hava sent føroyingum eina nýggjársheilsu

## The Royal Highness:



Tá ið vit í The Royal Higness hugsa aftur á okkara fyrsta ár, eru tað nøkur minnir, ið vit fyrst hugsa um. M.a. okkara fyrsta konsertferð í USA, okkara konsert á SPOT festivalinum, at sita saman við Alain Johannes og Natashu Shneider úr bólkinum Queens of the Stone Age og skriva tónleik, og sjálvsagt øll tey glaðu andlitini, ið ein sær tá ið ein spælir konsertir. Eitt av teimum minnunum, ið vit heilt vist altíð fara at minnast úr 2005, eru tær tríggjar konsertirnar, vit spældu í Føroyum, tí eg haldi, at ein skal leita leingi eftir meiri tilvitaðum áhoyrarum. Gestablíðni var eisini ótrúligt. 1000 takk fyri at tit gjørdist ein partur av okkara 2005, og eitt ordiliga gott nýggjár ynskja vit tykkum.

**Vinarliga**
**The Royal Highness**

## Ana Johnson:



Eg vil ynskja tí føroyska fólkinum eitt gott nýggjár. Vónandi verður 2006 eitt eydnuríkt ár fyri tykkum øll. Eg vil eisini nýta hendan møguleikan at takka tykkum fyri tí heitu móttøku, sum eg og mín bólkur fingu, tá ið vit vitjaðu Summarfestivalin í Klaksvík í Summar. Vit vóru øll ovfarin av tí ótrúligu náttúruni og av øllum teimum fittu fólkunum, ið vit møttu. Vit vilja avgjørt koma aftur til Føroya í 2006.

Eisini vil eg persónliga heilsa Elsu, sum var so fitt at loyva okkum at ríða á hennara rossum á okkara vitjan. Stórt klemm til tín, Elsa! ;)

**Ansið eftir tykkum og eitt gott 2006**

**Ana Johnson**



## Shakin' Stevens:

Eg vil ynskja øllum føroyingum eitt sera gott og sunt nýggjár, og eg takki fólkinum fyri tí góðu móttøkuna, eg fekk í august.

Eg fari altíð at minnast tí vøkru sjón, tá ið eg ferðaist kring landið. Fólkið var eisini ótrúligt.

**Shakin' Stevens**